**Elinborg Lützen**

**1919-1995**



Grafikarin Elinborg Lützen er kend fyri sínar staklutakendu og hugflogsríku linoskurðar. Í teimum verður alt í náttúruni livandi, frá gandakenda havbotninum til ævintýrligu bergini. Í huldisligu landsløgunum í linoskurðunum finnast alskyns trøll, heksir og aðrar sagnkendar verur.

**Neytakonur, 1985**

Elinborg gevur landslags- og húsamyndum sínum ein gandakendan dám við at heinta háljósið í pappírinum fram við hundraðtals elalítlum skurðum í linoplátuni. Skurðurin fær ikki myrkrið frá svertuni at hvørva, men fær myndina at virka í sparnum mánalýsi.

Sum dømi um fólkamyndir skarar myndarøðin av *Neytakonum* framúr. Hendan myndin er gátuførog samstundis tætt knýtt at tí gamla siðbundna arbeiðnum at fara til neytar (at fara at mjólka kúnum, sum ganga í haganum). Hendan myndin er framúrskarandi skorin og eitt satt meistaraverk.



Elinborg Lützen, *Neytakonur* 1985

♥ Finn myndina og set kross: ☐

♥ Er hetta ein litmynd ☐ ella ein svart/hvít mynd ☐

♠ Passar ein neytakona neyt ☐ ella mjólkar hon neytum ☐

♠ Hvat bera konurnar á bakinum? spannir ☐ dyllur ☐ bollar ☐

♦ Hvat hevur fremsta konan í hondunum?

♦ Hvat er myndin prentað á?

♣ Hvat gerst svart og hvat gerst hvítt, tá myndin verður prentað?

♣ Hvat huglag fær listakonan burturúr at hava tríggjar konur?